Úr skápinum:

# Grótu eina løtu og so fór mamma at hyggja eftir fótbólti

**Eiler Fagraklett, sum saman við Sonju Jógvansdóttir og Annlis Bjarkhamar seinnu árini er vorðin ímyndin av stríðnum fyri teimum samkyndu, var heili 30 ára gamal, tá hann fortaldi mammu síni, at hann var samkyndur. – Tað var í so seint, men eg visti, at tað fór at verða torført, og tí bleiv eg við at skjóta tað, fortelur Eiler. Vit hava vitjað marknaðarstríðsmannin, sum ikki hevur fingið hendurnar niður enn, eftir at Løgtingið farna fríggjadag samtykti, at samkynd skulu kunnu gifta seg borgarliga**

Leif Láadal

Uttanfyri hvítu húsini á Signabø stendur ein vanligur svartur Honda. Á høgra bakskermi er eitt lítið litríkt flagg. Tað er altjóða ælabogaflaggið. Mitt fyri á baklúkuni er eitt annað frámerki. Tað eru einar 12-14 djúpar foyrur, sum onkur hevur skavað niður í lakkið.

- Tær vóru bara har ein morgun, og eg veit ikki, hvør ið hevur gjørt tær, men eg meldaði tað, fortelur Eiler Fagraklett.

Orsøkin til, at tað bleiv til eitt politimál, var tí at Eiler samstundis, sum onkur gjørdi seg inn á bilin hjá honum, hevði fingið navnleysar hóttanir við postinum.

- Lat tað bara vera ósagt her, hvat ið stóð í brøvunum, men tað vóru ikki pen orð, fortelur Eiler.

Politiið fann tó hvørki tey, sum hóttu ella skøvaðu.

### Boða gleðiboðskap

LGBT varð stovnað fyri fimm árum síðani. Felagsskapurin bygdi víðari upp á tað arbeiði, sum Friðarboðin hevði gjørt.

- Vit valdu tó eina aðra strategi. Heldur enn at fortelja fólki, hvussu ringt vit høvdu tað, valdu vit at fokusera upp á tað jaliga. Vit vildu hava samkynd at kenna seg væl, og tí var nógv orka brúkt upp á at fáa fólk at trívast og ikki kenna seg einsamøll, eins og tiltøk sum Pride og onnur skuldu fáa almenningin – ella ein stóran part av honum – við okkum, fortelur Eiler.



Mær dámdi best at spæla við gentur, men tá eg byrjaði í fólkaskúlanum, bleiv lívið meira kynsbýtt



**Nú, vit eru komin á mál við hjúnabandslógini, kann eg gott fortelja, at nógv okkara hava verið fyri rættiliga ófantaligum verbalum álopum og hóttanum**



Endurbrandingin av felagsskapinum eydnaðist. Tá LGBT varð stovnað, vóru 20 limir, í dag eru yvir 200, og vangin hjá felagsskapinum á Facebook hevur nærum 10.000 likes.

Men tað hevur ikki altíð verið lætt.

- Nú, vit eru komin á mál við hjúnabandslógini, kann eg gott fortelja, at nógv okkara hava verið fyri rættiliga ófantaligum verbalum álopum og hóttanum. Men vit valdu heilt bevíst ikki at fara út alment við tí, tí so vildi fokus verið har og ikki á sakini, sigur Eiler, sum hesi fimm árini hevur sitið í nevndini hjá LGBT sum talsmaður.

### Litríka heimið

Inni í gongini hjá Eiler vinstrumegin hongur ein av tveimum stórum sjálvsmyndum, sum hann fekk málað í Teilandi á sinni. Rundan um myndina eru greinar og bløð úr plasti við grønum, gulum, reyðum og violbláum perum. Og tað er bara gongin. Stovan er enn litfagrari. Miðskeiðis í rúminum hongur eitt hvítmálað træ. Millum glaskúlurnar og jólatræsperurnar ansar ein svartur ravnur eftir heiminum. Í einum króki stendur ein gamal handilsdiskur við køkum, ketjuppdunkum, sukurskál, smáum sjálvlýsandi dukkum, gomlum colafløskum og øðrum – alt hetta eisini úr plasti. Her spæla tey 10 gubbabørnini hjá Eileri handil, tá tey eru og vitja.

- Eg keypti handilsdiskin frá Reyða krossi. Hann er úr einum handli av Viðareiði, og tað mesta er frá 2. heimsbardaga ella har á leið, fortelur Eiler.

### Tók sína tíð

Eiler Fagraklett er miðskeiðis í 30-árunum. Hann hevur altíð vitað, at hann var samkyndur, men tað tók sína tíð at koma ordiliga úr skápinum, sjálvt um tey flestu, sum kenna hann, hava havt ein varhuga ella vitað tað, síðani hann var barn.

- Eg hevði sum so ein góðan uppvøkstur. Var altíð kreativur og teknaði nógv. Mær dámdi best at spæla við gentur, men tá eg byrjaði í fólkaskúlanum, bleiv lívið meira kynsbýtt, minnist Eiler.

Tey fyrstu sjey árini í fólkaskúlanum vóru tí hørð. Áhugin fyri dreingjalutum og -spølum var avmarkaður, og harafturat hevði Eiler nøkur kilo ov nógv á rivjabeinunum, so hann var eitt lætt offur fyri happing.

- Í dag hugsi eg ikki so nógv um tað, og eg havi eisini fortrongt ein stóran part, men eg minnist, at tað var ein hørð tíð, fortelur Eiler, og hyggur út gjøgnum vindeygað.

FRAMHALD Á SÍÐU 10

# Kirkjan má sjálv taka støðu

Nógv kjak hevur verið, um samkynd skulu sleppa at gifta seg í kirkju ella samkomum, men tað er ein spurningur, sum LGBT ikki blandar seg uppí.

- Onkur royndi at grugga málið við at øsa fólk upp, men tað hevur ongantíð verið ætlanin hjá okkum at sleppa inn í kirkjur og samkomur at gifta okkum, sigur Eiler Fagraklett, talsmaður fyri LGBT.

- Málið hjá okkum var at sleppa at giftast borgarliga, og um kirkjan ella samkomurnar skulu taka støðu til nakað, so verður tað eitt mál fyri tær, leggur hann afturat.

Í øðrum londum hevur tað víst seg, at trýstið á kirkjuna og samkomurnar er komið innanífrá, og ikki frá felagsskapum, sum tala søkina hjá teimum samkyndu. Og soleiðis verður tað kanska eisini í Føroyum. Í hvussu so er, so fer LGBT ikki at gera nakað við hetta. Framtíðar virksemið hjá LGBT fer millum annað at snúgva seg um yvirtøkuna av familju- og arvarættinum.

- Tá Føroyar fáa ræðið á hesum málsøki, hevur tað týdning fyri felagið, at tey samkyndu, biseksuellu og transpersónar ikki detta niðurímillum, sigur Eiler Fagraklett.



Hinumegin fjørðin liggur barndómsheimið.

### Kemur varliga úr skápinum

Tá Eiler flutti til Onglands at lesa marknaðarfrøði á lærda háskúlanum í Lancaster, valdi hann at liva sum opin samkyndur har. Har kom hann í samband við onnur, sum høvdu tað sum hann, og hann fekk kunnleika um LGBT-rørsluna. So hvørt, sum vinfólk í Føroyum fregnaðust, fingu tey at vita, at hann var komin úr skápinum, men ein stór uppgáva mangladi. Mamman.

Í sínum uppvøkstri hevði Eiler av og á hoyrt mammuna tosa háðandi um samkynd. Tá okkurt var frammi í útvarpinum ella bløðunum, kundi hon koma við viðmerkingum, sum vóru alt annað enn tolnar.

- Mamma kundi finna uppá at siga, at hatta var nakað svínarí og líknandi, fortelur Eiler og hansara brá verður fjart, eins og leitar hann eftir einari forklaring ella umbering mammuna vegna. Og so kemur hon:

- Eg skilji hana í veruleikanum. Hun er vaksin upp í einum lítlum samfelag, har fólk gingu runt og váttaðu hvønn annan um, at heteroseksualitetur er tað einasta normala, og hon lat seg ríva við.

Men mamman broyttist við tíðini.

- Hon byrjaði at siga nakað soleiðis: "Tað skal eisini vera pláss fyri teimum". Ávirkanin av fylgisveinasjónvarpi og tí, sum hon las á internetinum, lat heimin upp, og tí visti eg, at hon var við at vera klár, fortelur Eiler.

## Manglaðu eina "kvinnu" í nevndini

Fleiri samkyndir menn hava bæði evnir og áhuga fyri tí listarliga og dekorativa. Soleiðis er eisini hjá Eileri Fagraklett. Hesin áhugin – eins og evnini hjá honum innan marknaðarfrøði – hevði fyri einum ári síðani við sær, at Eiler fekk ein serstakan fyrispurning um at koma við í nevndina hjá felagnum Gist & Vist, ið millum annað rekur Hotel Føroyar og fleiri matstovur niðri í Gongini við Kongabrúnna.

- Stjórin í felagnum spurdi meg, tí sum hann segði, so manglaðu tey eitt kvinnuligt "touch" í nevndini, fortelur Eiler og smílist um alt andlitið.

### Grátur og fótbóltur

Tað var ein várdag fyri seks árum síðani. Eiler hevði verið í Havn og arbeitt og var á veg aftur til Kollafjarðar. Hann búði tá í kjallaraíbúðini í húsinum hjá foreldrunum. Pápin var úti og sigldi og mamman var einsamøll heima. Eftir at hava verið sjúkrameldaður fyri strongd í nakrar mánaðir, var hann farin aftur til arbeiðis í Havn, og hann gekk framvegis til sálarfrøðing av og á. Sálarfrøðingurin hevði sagt Eileri, at hann burdi fortalt mammu síni um sín samkyndleika, tí tað var týðiligt, at tað píndi hann at ganga og lata sum einki.

Á veg norður lurtar Eiler eftir útvarpinum, og tá hann hoyrir sangaran syngja um tað at liva og vera erligur, tekur hann avgerðina. Nú skal mamman hava tað at vita.

Tey bæði eta fyrst náttúrða saman, og tá hann er etin, hyggur Eiler upp á mammu sína og spyr, um hon elskar hann treytaleyst. Hetta er kanska ikki ein spurningur, sum ein mamma fær so ofta frá 30 ára gamla barni sínum, so hon svarar við at spyrja:

- Hvat er nú galið?

- Mamma, tú veitst, at eg eri samkyndur, staðfestir Eiler.

Hann hevði roknað við, at mamman fór at siga ja, men tað gjørdi hon ikki. Hon setti seg niður og segði ikki eitt orð í fleiri minuttir. Fekk eitt lítið sjokk. Tá hon hevði summað seg, reistist hon aftur, fór yvir til Eiler og klemmaða hann, og segði honum, at hon elskaði hann yvir alt, og so grótu tey saman eina løtu. Tá gráturin hevði lagt seg, og tey bæði høvdu fingið tosað eitt sindur um støðuna, reisti mamman seg brádliga.

- Nei, hetta ber ikki til. Dysturin er byrjaður, segði hon og fór so inn í stovuna fyri at hyggja eftir Champions League.

Tá pápi Eiler kom heim nakrar vikur seinni, fekk hann tað eisini at vita, men hansara reaktión var rættiliga ódramatisk. Tað kendist týðiliga, at hetta hevði pápin vitað í nógv ár.

### Eitt savnshús

Tað eru ikki bara gongin og stovan hjá Eileri, sum eru pyntað og innrættað av einslistum. Tað eru kømuruni eisini. Trý av kømurunum hava ymisk evnir, sum vísa til lívið hjá Eileri. Eitt serligt kamar er halgað stóru fyrimyndunum Michael Jackson og Madonnu. Har eru plakatir, dukkur, plátur, bøkur, innrammaðar konsertbilettir og myndir. Millum annað ein mynd av Michael Jackson í einum vindeyga á Hotel D'Angleterre í Keypmannahavn, sum Eiler sjálvur



Eg rokni ikki við, at tað verða so øgiliga nógv samkynd brúdleyp beinanvegin, tí nógv av teimum, sum eru alment samkynd, eru ung í dag

hevur tikið. Eisini hongur eitt petti av einum turriklæði á vegginum. Turriklæðið blakaði Michael Jackson úr hesum sama vindeyga, og Eiler loftaði tí saman við trimum øðrum fjepparum. Heldur enn at fara til hendurs um tað, valdu tey at skræða tað í fýra, so øll fingu eitt petti.

Áhugin fyri tónleikinum og persóninum Michael Jackson kom, tá Eiler var 11 ára gamal. Amerikanski sangarin avloysti legoleikurnar, kann man siga. Eiler kundi spegla sær í síni fyrimynd, sum upp á nógvar mátar eisini var einsamallur og misskiltur.

- Eg var púra garvillur fjeppari fyrstu árini, men tað kom í eina skulu vit siga vanliga legu sum fráleið, fortelur Eiler, sum náddi at vera til tvær konsertir hjá Michael Jackson.

Tað kundi havt blivið til fimm konsertir, tí Eiler hevði keypt biletttir til tríggjar konsertir í London, men hesar máttu sum kunnugt avlýsast, tá Michael Jackson brádliga doyði sum 50 ára gamal.

- Ein av bilettunum hongur har, sigur Eiler og peikar á veggin.

- Hinar báðar lat eg inn aftur og fekk pengarnar aftur, men eina vildi eg varðveita, leggur hann afturat.

## Friður eina løtu

Seinnu árini hevur Eiler ikki krógvað seg aftanfyri Michael Jackson og Madonnu og droymt seg inn í ein heim, har tað eisini var pláss fyri honum. Síðani hann kom úr skápinum – alt for seint, sum hann sjálvur sigur – hevur lívið verið øðrvísi, tó at onkrir bardagar máttu takast og onkur ókvæmisorð slúkast.

- Tað hevur verið ein ómetaliga spennandi ferð seinastu fimm árini, og eingin er so glaður sum vit í "tríeinigheitini", sigur Eiler og sipar til vinarlagið og arbeiðsbólkin hjá honum og Sonju Jógvansdóttir og Annlis Bjarkhamar.

- "Tríeinigheitin" skal ikki skiljast átrúnaðarliga, men bara tí, at vit hava verið einig ella samd um tað mesta, skundar hann sær at leggja afturat.

Tað eru tey, sum halda, at LGBT og Eiler hava verið í so nógv frammi seinnu árini, og siga seg gleða seg til, at tað nú verður eitt sindur kvirrari rundanum felagsskapin og Eiler. Hetta skilir Eiler væl.

- Eg gleði meg eisini til at slappa eitt sindur meira av, nú hjúnabandslógin verður broytt, og tað, sum er fyri framman, verður eisini meira hugaligt at fáast við, sigur hann og sipar til tey brúdleyp, ið nú verða.

- Eg rokni ikki við, at tað verða so øgiliga nógv samkynd brúdleyp beinanvegin, tí nógv av teimum, sum eru alment samkynd, eru ung í dag. Men tað eru nøkur pør, sum hava sagt, at tey nú fara at gifta seg – millum annað Annlis og Sonja, og har skal eg vera við til at skipa fyri brúdleypinum og brúðarveitsluni, sigur Eiler glaður.

Eisini gleðir hann seg til Pride, sum verður uppundir ólavsøku.

- Tað verður tað størsta føroyska Pride "ever", sigur Eiler.


## Starvsfólk til umhvørvisverkætlanir – barnsburðarvikarur

**Umhvørvisstovan sóknast eftir starvsfólki til granskingardeildina, ið kannar útbreiðslu og árin av umhvørviseitrandi evnum.**

**Um starvið**
Starvið fevnir um kanningar á framkomnum kanningartólum, sýnistøku, dátuviðgerð og at skriva frágreiðingar og greinar umframt ymiskt fyrifallandi arbeiði. Arbeiðið er í stóran mun skipað í verkætlanum.

**Um teg**
Tú skalt vera MSc ella PhD í evnafrøði, duga væl at handfara kanningartól (t.d. MS/MS) og hava hollan telduførleika. Tú skalt skilja føroyskt og duga væl at samskifta á norðurlendskum og enskum, vera nærlagdur/nærløgd og hava koyrikort.

Talan er um avloysarastarv fyri eitt starvsfólk í barnsburðarfarloyvi. Starvstíðin er 1 ár og verður at seta skjótast gjørligt. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mariu Dam, deildarleiðara, tlf. 342470, mariad@us.fo.

Umsókn við CV, avrit av prógvum v.m. skal sendast til Umhvørvisstovuna, box 2048, FO-165 Argir, og verða okkum í hendi í seinasta lagi **19. mai 2016.**

umhvørvisstovan
Traðagøta 38, postboks 2048, 165 Argir, tel 342400, fax 342401, us@us.fo






## Skrivstovu-/handilsbygningur til leigu í miðbýnum í Havn

Vit flyta í onnur høli vegna økt virksemi, tí er snøggur bygningur í Niels Finsens gøtu við nógvum nýtslumøguleikum og stórari vindeyga síðu til leigu.

Bygningurin er nýtímansgjørdur í 2006 og er í trimum hæddum, í alt 230 fermetrar til støddar.

Er vælegnaður til skrivstovu og tænastuvinnu. Bygningurin er innrættaður við fundarhøli, skrivstovuhølum, goymslurúmum, køki og tveimum vesum.

*Áhugaði kunnu ringja til Rúna Heðinson, kundastjóra, tel. 239873.*

ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI